# Semjuskjal millum Hvalbiar Kommunu og Tvøroyrar Kommunu

Semjuskalið er gjørt í sambandi við eina møguliga samanlegging millum Hvalbiar Kommunu og Tvøroyrar Kommunu aftaná eina vegleiðandi fólkakvøðu, har fólkið kann siga JA ella NEI til samanlegging.

Heitið á nýggju kommununi verður Suðuroyar Kommuna.

Skúlarnir verða lagdir saman, og skúlaøkið verður framhaldandi skipað í verandi skúlabygningum í Hvalba og á Tvøroyri.

Barnaansingin verður í Hvalba og á Tvøroyri.

Barnafrádrátturin verður 8.000,- kr.

Ungdómshús verður bæði í Hvalba og á Tvøroyri. Hvalbiar Kommuna setir pening av til rakstur av ungdómshúsi í ár.

Nýggja kommunan letur frítíðarkort til børn/ungdómin, áljóðandi kr. 2.000,- til hvørt barn.

Ókeypis bussamband verður millum bygdirnar, fyri at sameina og samansjóða ungdómin í skúla-mentanar- og frítíðarøkjunum.

Ein framtíðar eldradepil skal byggjast í Hvalba. Heilsudepil skal byggjast á Tvøroyri.

Kommunal starvsfólk, sum eru í starvi, halda fram í nýggju kommununi, undir einari nýggjari, góðkendari starvsfólkaskipan.

Býráðið og umsitingin í Suðuroyar Kommunu hevur høvuðssæti á Tvøroyri.

Økismenning, projekt Skálamøl og menning av ferðavinnu verður staðsett í Hvalba. Hvalbiar Kommuna setir pening av til økismenningarvirksemið í ár.

Suðuroyar Kommuna hevur 11 býráðslimir. Í minsta lagi tveir árligir býráðsfundir verða hildnir í Hvalbiar sókn.

Farið verður undir fyrireikingar til framtíðaravbjóðingina við undirsjóartunnlinum, herundir framtíðar útstykkingar í Hvalba og á Tvøroyri við fjølbroyttum bústaðarmøguleikum.

Avbjóðingin við Bú- og heimatænastuni í Suðuroy, har vald og gjald ikki hanga saman, má loysast.

Suðuroyar Kommuna orðar ein barna-, ungdóms- og eldrapolitikk.

Semjuskjal einmælt samtykt av stýrisbólkinum hin 5. mai 2024, og verður sum fyriliggjandi sent til samtyktar í Hvalbiar bygdaráði og Tvøroyrar býráði.

| Janus Thomsen | Poul Laust Christiansen | Kristin Michelsen | Jónleyg Jespersen Bech |
|---|---|---|---|